

# Hvussu væl kennir tú Bíbliuna?

## Jólakapping fyri børn upp til 17 ár

Nú jólini standa fyri durum, fara vit á Sosialinum undir eina kapping við spurningum til børn og ung upp til 17 ár um mangt og hvat í Gamla og Nýggja Testamenti.

Vit byrja í dag hósdag 4. desember við sjey spurningum. Teir skulu øll tit, ið vilja vera við í kappingini, klippa út, svara, skriva navn, bústað, tel. og aldur á, og goyma. Tað sama skulu tit gera við spurningarnar, vit hava til tykkara í hvørjum Sosiali til og við mikudag 17. desember, tá kappingin endar.

Allir spurningarnir í kappingini eru ikki líka lættir at svara. Tá kunnu tit til dømis fara í bíbliusøgurnar, tit lesa ella hava lisið í skúlanum at finna svarini. Ella hví ikki spyrja tey tilkomnu í húsinum! Í telduni ber eisini til at leita eftir svarum.

Leparnar, tit hava klipt út og goymt *(við spurningum, svarum, navnið, bústaði, tel. og aldri)* skulu tit senda Sosialinum í seinasta lagi leygardagin 20. desember. Í brævbjálvanum til okkara skal sama navn standa á øllum lepum. Uttaná skal standa "Jólakapping 2003", navn á luttakara og bústaður. Tit, ið tá hava sent allar lepar inn og svarað rætt, verða við í lutakasti um fýra virðislønir.

Við vón um undirtøku frá hópin av børnum og ungum um alt Føroya land, ynskja vit øllum ein góðan jólamánað.

HESTPRENT - TEL. 314 555

VINNINGAR:

**1. Vinningur:**

**Vikuskiftisferð fyri tvey til Íslands**

ATLANTIC AIRWAYS


Blue Lagoon




## Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

*Spurningar úr Nýggja Testamenti*

| Spurningar | Tykkara svar |
|---|---|
| 43 Hvussu æt kongurin í Jødalandi, tá ið Jesus varð føddur? | : |
| 44 Tá ið Jósef fekk boðini, at øll skuldi skrivast í manntal, fór hann við Mariu til Betlehem, ættarbygd sína. Hvør var ættfaðir hansara? | : |
| 45 Hvussu mangir vóru vísmenninir, sum komu úr Eysturlondum at tilbiðja Jesusbarnið? | : |
| 46 Hvussu eitur bygdin, har Jesus vaks upp hjá Mariu og Jósef? | : |
| 47 Hvussu gamal var Jesus fyrstu páskirnar, hann fór við Mariu og Jósef til Jerusalem, har tey mistu hann burtur, men funnu hann tríggjar dagar seinni í halgidóminum? | : |
| 48 Jesus var 30 ára gamal, tá ið hann fór undir tað virki, Gud hevði sent hann til. Eitt tað fyrsta, hann gjørdi, var at lata seg doypa. Hvussu eitur áin, har tað hendi? | : |
| 49 Fyrstu lærusveinarnar, sum fylgdu Jesusi, itu Jóhannes og Andrias. So kom Andrias til hann við beiggja sínum Símuni. Honum gav Jesus eitt annað navn, sum merkir klettur. Hvat var navnið? | : |

**Navn á luttakara:** ______ *Bústaður:* ______

**Telefon:** ______ *Aldur:* ______

At klippa út og goyma, til kappingin endar 20. desember. Seinasta freist at senda Sosialin allar útkliptu leparnar við spurningum og svarum, navni á luttakara, bústaði, tel. og aldri, er leygardagin 20. desember. Uttan á brævbjálvanum skal standa Jólakapping 2003, umfram navn á luttakara og bústaður. Minnist til, at allir lepar í brævbjálvanum frá hvørjum einstøkum luttakara, skulu hava sama navn.

**Sosialurin** Postboks 76 FO-110 Tórshavn Tel. 341 800 • Fax 341 801

# JÓLASÍÐAN



































